# Byggja handilsmiðdepil í Vestmanna

**Vestmenningar kunnu skjótt gleða seg til, at ein stórur handilsmiðdepil verður bygdur í Vestmanna. Talan er um ein bygning upp á tilsamans okkurt um 2.000 fermetrar, ið skal byggjast inni á Fjørð**



Myndatekstur:
*Forarbeiðið til nýggja handilsbygningin inni á Fjørð í Vestmanna er longu farið í gongd. Menn eru farnir undir at grava økið upp, so at tað sum skjótast kann farast undir at byggja.*
Mynd: www.vestmanna.fo

HANDILSBYGNINGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað eru ikki hissini ætlanir, ið tríggir ungir mans hava fyri handilslívið í Vestmanna. Teir tríggir menninir hava nevnliga ætlanir um at byggja ein stóran bygning inni á Fjørð, ið skal verða ein handilsmiðdepil í bygdini.

### sHandlar og skrivstovur

Teir tríggir menninir, ið hava ætlanir um at byggja bygningin, eru tveir vestmenningar, Petur Frank Joensen og Háldan Haldasen, og so klaksvíkingurin Finn Johannesen. Teir hava arbeitt við ætlanini í fleiri mánaðar, og nú bíða teir eftir endaliga byggiloyvinum frá Vestmanna Kommunu.

- Vit hava fingið tilsøgn um byggiloyvi frá kommununi, men enn er tað ikki endaligt, og tí eru vit í eini bíðiposition, sigur Finn Johannesen. Tó er tað fyrireikandi arbeiði við at gera økið klárt farið í gongd, og stigtakararnir vænta ikki, at tað verður leingi, áðrenn teir fáa grønt ljós frá kommununi.

Hann sigur, at bygningurin, ið ætlan er um at byggja, verður í tveimum hæddum, og at hvør hæddin hevur ein gólvvídd upp á umleið 1.000 fermetrar. Sostatt verður samlaða gólvvíddin í nýggja handilsmiðdeplinum umleið 2.000 fermetrar.

Men hvat verður so í nýggja handilsmiðdeplinum?

- Vit hava sjálvir ætlanir um ein stóran matvøruhandil, og so verður eisini ein bakari. Í ovaru hæddini verður pláss fyri fleiri skrivstovum, og ein stórur partur av tí plássinum er longu umbiðin. Men pláss er eisini fyri fleiri handlum, sigur Finn Johannesen.

Stigtakararnir halda, at tørvur er á einum stórum matvøruhandli í bygdini, tí sum nú er, eru tríggir smærri matvøruhandlar spjaddir runt um í bygdini, men við einum størri handli er møguligt at hava eitt breiðari vøruúrval enn við teimum smáu.

### Torg til tiltøk

Nýggi bygningurin kemur at liggja, har fótbóltsvøllurin hjá vestmenningum hevur ligið. Tað vil siga beint yvir av Shell-støðina, beint tá ið komið verður til bygdina.

Finn Johannesen sigur, at ætlanir eru eisini um, at eitt stórt torg skal verða í bygninginum, ið skal verða eitt slag av einum miðdepli fyri ymisk tiltøk í bygdini.

- Vit halda, at vestmenningar eru ógvuliga lokalir, og tí ætla vit at skapa eitt pláss, har teir kunnu savnas til ymisk tiltøk. Nú eri eg sjálvur klaksvíkingur og harvið bláur KÍ'ari í hjartanum, og eg havi varhugan av, at allir vestmenningar eru gulir VÍF'arar í hjartanum og stuðla felagnum av øllum alvi. Eitt slíkt torg kann til dømis nýtas til ymisk tiltøk hjá júst VÌF ella eitt nú Agenda 21 felagnum í bygdini, sum jú eisini er ógvuliga aktivt, sigur Finn Johannesen. Hann sigur, at teir vóna, at vestmenningar eisini fara at taka undir við, at eitt slíkt torg kann gerast nýggi mentanarmiðdepilin í bygdini.

Finn Johannesen vil ikki siga nakað um, hvussu nógv nýggi bygningurin kemur at kosta.

# Blindur passagerur við Norrønu

**Ein maður, ið hevði keypt sær bát úr Danmark, gjørdist kløkkur, tá ið hann fór umborð á Norrønu tíðliga mánadagin at hyggja at nýggja bátinum hjá sær, tí í bátinum fjaldi ein blindur passagerur seg**

BLINDUR PASSAGERUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nýggi báturin stóð á bildekkinum umborð á Norrønu, og maðurin fór sum vera man spentur umborð at síggja nýggja bátin hjá sær. Tá ið maðurin letur upp í bátinum, gerst hann ikki sørt kløkkur, tí inni í bátinum goymir ein ungur útlendskur maður seg.

### Vita ikki hvagani hann er

Hóast fremmandi maðurin royndi at sleppa til rýmingar, eydnaðist hetta ikki, og løgreglan bleiv boðsend.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini, sigur, at løgreglan hevur staðfest, at maðurin er komin umborð í Hanstholm, hagani Norrøna kom. Tað eydnaðist tó ikki løgregluni at finna út av, hvagani maðurin kom, men Bergleif Brimvík sigur, at talan er ein útlending.

Maðurin hevði ikki ferðaseðil við Norrønu, og hann hevði heldur ikki loyvi at koma hendan vegin. Sambært norðurlendsku passreglum merkir hetta, at maðurin skal sendast aftur til Danmarkar, og tað er longu gjørt.

Bergleif Brimvík sigur, at maðurin er farin til Danmarkar við flogfari, og at tveir føroyskir løgreglumenn fóru við honum. Tá ið komið var til Danmarkar, stóð danska løgreglan so fyri teimum og tók mannin.

Spurdur um hetta er nakað, ið kriminalløgreglan sær fólk, ið royna at sníkja seg til Føroya, sum ein vaksandi trupulleika, sigur Bergleif Brimvík, at tað er tað ikki. Hann sigur, at slíkt kemur fyri av og á, men talan er ikki um nakran vaksandi trupulleika.




*Ferðafólkatalið umborð á Norrønu, tá ið hon kom til Føroya úr Danmark fyrr í vikuni, var eitt sindur hægri, enn tey á Smyril Line vistu av, tí umborð á skipinum fjaldi ein blindur passagerur seg*

*savnsmynd*